Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystir A3

Á **A3** er fulltíðar avloysarastarv sum sjúkrasystir í skiftandi vaktum leyst til setan 1. apríl 2002 til og við 31. mars 2003.

Deildin er ein kirurgisk 5-dagadeild, ætlað sjúklingum innlagdir til styttri kanningar/-viðgerðir. Vit hýsa sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, urologiskum, ortopædiskum, eygna-, oyrna-, nøs- og hálsasjúkum. Deildin hevur 20 seingjarpláss og er í tøttum samstarvi við ta støðugu seingjardeildina.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- góð samstarvsevnir
- opin og positiv

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Ceciliu Vestureið, yvirsjúkrasystir, telefon 31 35 40 kallari/lokal 499.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 25. mars 2002 kl. 12.00

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystir avloysari

**til B8 - cardiologisk/intensiv deild**

Eitt avloysarastarv á B8 á starvsbrøki 0,8 sum sjúkrasystir í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan frá 1. apríl 2002 til og við 31. desember 2002.
Á deildini eru 12 cardiologiskar og 6 intensivar sengur.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Annemi Joensen, deildarsjúkrasystir, tlf. 313540, lokal 108 ella til Ása Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300, e-post asap@ahs.fo

Umsóknarfreistin er 25. mars 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Sandoyar sýslu
Javnaðarfelag

hevur uppstillingarfund í
Ungmannafelagshúsinum á Sandi hósdagin
tann 7. mars 2002 kl 20.30

Nevndin

**DVEYLAN**
**Gólv- og vegg vask**



- **Vinyl**
- **Linolium**
- **Flísar**
- **Teppir**
- **Veggir**

**Tygum eru vælkomin at ringja og fáa eitt óbindandi tilboð.**

**J.C. Svabosgøta 40**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 31 41 75**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2431, Sp/f Sæbjarnavík, 800 Tvøroyri.

Viðtøkur broyttar:
12.02.2002.
Kapitalur:
Hækking við kr. 10.000,00 til kr. 530.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 10.000,00 til kurs 3.250
Nevnd:
Farin úr nevndini: Pade Christian Juul Thomsen, 826 Trongisvágur (formaður), Maren Bergithe Sigmunda Petersen, 825 Froðba, Thomas Frederik Thomsen, 800 Tvøroyri, Viberg Pauli Sørensen, 826 Trongisvágur, Signar Halvdan Mortensen, 827 Øravík, Ásmund Bærendsen, 826 Trongisvágur og Fróði Olsen, 800 Tvøroyri.
Innkomin í nevndina:
Petur Don West Hammer, 800 Tvøroyri (formaður), Hendrik Thomsen, 800 Tvøroyri og Richard Lorenz Thomsen, 800 Tvøroyri.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Thomas Frederik Thomsen, 800 Tvøroyri.
Innkomin sum stjóri:
Richard Lorenz Thomsen, 800 Tvøroyri.
Endamál: Endamál felagsins er keyp, søla og útleigan umframt annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. mars 2002

Kristin Balle



# Skeið á Húsarhaldsskúla Føroya

**Broyt tínar matvanar soleiðis at tú kanst liva meiri heilsugott**

Skeiðið er til kvinnur og menn ið hava ov høgt blóðtrýst, ov nógv kolesterol í blóðinum, diabetes typu 2, viga ov nógv ella hava áhuga í heilsugóðum mati.

| Kl. | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 09.30 – 10.15 | Bólkur A+J | Bólkur E+L | Bólkur N+O |
| 10.15 – 11.00 | Bólkur A | Bólkur E | |
| 13.00 – 13.45 | Bólkur B+K | Bólkur F+M | Bólkur H |
| 13.45 – 14.30 | Bólkur B | Bólkur F | Bólkur H |
| 17.00 – 18.30 | Bólkur D | Bólkur G | |

***Bólkur A,B,D,E,F,G og H eru byrjunarskeið***
***Bólkur J,K,L,M, N og O eru framhaldsskeið***

**Skeiðið byrjar:** 13 mars, undirvíst verður 1 ferð um vikuna í 10 vikur.
**Undirvísarar:** Jóhanna á Tjaldrafløtti, og Elisabeth Akursmørk,
**Kostnaður:** kr. 700,– fyri byrjunarskeið og 400 kr fyri framhaldsskeið. Gjaldast skal fyrsta dagin.

**Lær at seyma vest til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)**

Lær at seyma vest til føroyska búnan.
Vikuskiftisskeið 5 – 6 apríl og 12 – 13 apríl

**Skeiðið byrjar:** fríggjakvøld kl. 19.00 – 22.00 og leygardag frá kl. 9.30 – 16.30
**Undirvísari :** Malena Andreasen
**Kostnaður:** kr. 700,– íroknað mat, ikki tilfar

**Lær at seyma buksur til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)**

Lær at seyma buksur til føroyska mannfólkabúnan
Vikuskiftisskeið 3 – 4 mai og 10 – 11 mai.

**Skeiðið byrjar:** fríggjakvøld kl. 19.00 – 22.00 og leygardag frá kl. 9.30 – 16.30
**Undirvísari:** Malena Andreasen
**Kostnaður:** kr. 700,– íroknað mat, ikki tilfar

**Brodering til føroysk klæðir/pergamano: (vikuskeið)**

Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæð og turriklæð til føroysk klæðir úr føroysku floraðini,og í brodering og montering. Møguleiki er eisini at brodera og at tekna mynstur til ymiskt annað.
Eisini verður frálæra givin í pergamano gera ymisk kort og annað.

**Skeiðið byrjar:** 29. apríl. Undirvíst verður frá kl. 9.00 – 16.00
Skeiðið endar fríggjadagin 3. mai kl. 15.00
**Undirvísari:** Jutta Hansen
**Kostnaður:** kr. 1200,– íroknað mat, ikki tilfar.

**Tilgerð av knappatroyggju til mannfólkabúnan (vikuskiftisskeið)**

Frálæra verður givin í tilgerð av knappatroyggju til mannfólkabúnan.
Vikuskiftisskeið 17. – 18. mai og 24. – 25. mai.

**Skeiðið byrjar:** fríggjakvøld kl. 19.00 – 22.00 og leygardag frá kl. 9.30 – 16.30
**Undirvísari:** Elspa Sumberg
**Kostnaður:** kr. 700,– íroknað mat, ikki tilfar

**Heilsugóður matur/ymiskt handarbeið: (vikuskeið)**

Frálæra verður givin í heilsugóðum mati ymiskum handarbeiði, so sum silkimáling, seyming, brodering, leðurseyming føroysk bond o.a.

**Skeiðið byrjar:** 27. mai og endar 31. mai. Skeiðið er eitt vistarskeið
**Undirvísarar:** Jutta Hansen, Gunhild W.Arge, Paulina Eliasen, Elisabeth Akursmørk og Jóhanna á Tjaldrafløtti,
**Kostnaður:** kr. 1.500,– íroknað mat og gisting

Tilmeldað skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar. Møguleiki er fyri at gista á skúlanum, til øll skeiðini.
Til handarbeiðskeiðini er ikki neyðugt at hava seymimaskinu við. Skúlin hevur øll seymiamboð.

Fleiri upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til skúlan. Viðmerkjast skal at tað er avmarkað luttøka til øll skeiðini

**Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyrarvegur 29 • 700 Klaksvík
Tlf. 456974 • e-mail: hsf@post.olivant.fo



## HEILSANIR



**Góði, elskaði Tróndur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum 5. mars.
**Heilsan, mamma og babba**



**Góði Kristjan!**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 6. mars. Takk fyri eitt gott ár at hava havt saman, vóni vit fáa fleiri góð ár. Eg elski teg.
**Heilsan, tín Magna**



**Góðu Brynhild og Marta**
Hjartaliga tillukku við 1 og 4 ára føðingardøgunum.
**Heilsan, Hanna-omman**



**Hey, piparsveinur!**
Tillukku við piparinum. Alt tað besta ynskja vit tær í framtíðini.
**Heilsan, vit**
P.S. Hetta var ein góður túrur, ha?



**Góði Arnfinn**
Hjartaliga tillukku við piparinum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan, mamma og babba**



**Góða Lillian**
Tillukku við 26 ára degnum í dag og tillukku við soninum. Ja, nú telji eg so spent dagarnar til eg sleppi at trilla.
**Heilsan A**



**Góði, fitti gubbi**
Lukku og gleði á tínum pipardegi. Loksins varð daman funnin. Takk fyri at tú ert so góður við okkum.
**Linda Maria, Petur Lennard og Markus**



**Góða Annika**
Hjartaliga tillukku á 21 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan frá okkum, lítlibeiggi**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 26 ára degnum ynskja vit
**beiggin og babba**



**Góði, elskaði stóri/lítli beiggi**
Hjartaliga tillukku á 6 ára føðingardegnum 5. mars.
**Kærar heilsanir, Kristina og Grímur**



**Góðu Brynhild og Marta**
Hjartaliga tillukku við 1 og 4 ára føðingardøgunum 5. og 7. mars ynskja
**mamma og pabba**



## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«